## Góðu næmingar, góðu foreldur og avvarðandi. Góðu gestir og starvsfólk.

Hjartaliga til lukku. Fyrst og fremst til tykkum pisur, tykkara foreldur og avvarðandi, men eisini til lukku  til okkum øll, tí hetta er ein stórur og týdningarmikil dagur hjá okkum øllum.

Alt fær ein enda – tað fær miðnámstíðin á Kambsdali eisini. Í dag fara 150 pisur úr Kambsdalsreiðrinum og skulu royna flogið. Við á ferðina fáa tær nøkur próvtøl, lívsroyndir, vinabond og møguliga eitt sindur av forvirringini um, hvat nú skal henda.

Ein yrking, sum mær fór at dáma, tá eg var í tykkara aldri, er yrkingin hjá gøtumanninum Esmar Jacobsen Gata frá 1956:

> At kunna lagt frá sær.
> Lati tagna alt breyðtos
> og siti hatteysur
> á onkrum vegamóti
> leikandi fiól.

Tað er gott at hava greið mál og fara eftir teimum, men tað er eisini í lagi at seta seg niður á vegamóti og spæla fiól eina løtu.

## Góðu pisur

Summi seta sær stór mál. Sera stór. Ja kanska ov stór. Í 1980'unum í Arizona, USA var verkætlanin Biosphere 2 sett á stovn. Hetta var ein risastór innandura vistfrøðilig skipan. Høvuðsendamálið var at kanna, um man kann skapa eina sjálvberandi vistskipan – eina minijørð – sum kundi brúkast í rúmdini.

Biosphere 2 misseydnaðist. Til dømis vuksu trøini ræUttiliga væl, men tá tey náddu ein vissan aldur – koppaðu tey. Røturnar vóru ikki nóg sterkar. Einki illveður, eingin vindur, eingin turkur ella áarføri hevði nomið við tey. Inni í Biosphere 2 manglaði móstøðan, so røturnar kundu styrkna eins og tær gera uttanfyri. Jørðin og veruleikin vóru trupulari at skilja og at hava tamarhald á enn fólkini handan verkætlanin hildu.

Vit menniskju eru sum trø. Vit verða boygd hendan- og hinvegin av veðri og vindi. Við hvørt fáa við ovmikið av føslu og viðhvørt ov lítið. Onkuntíð er viðgongd og onkuntíð er mótgongd, og mótgongd kann vera so mangt.

Kanska tú dumpaði í onkrari lærugrein, kanska er eitt vinalag slitnað, kanska passar tú ikki inn í normarnar hjá hinum ella kanska hava tit onkra kreppu heima við hús. Avbjóðingarnar kunnu vera nógvar og ymiskar. Summi fáa størri avbjóðingar enn onnur.

Tað týdningarmesta er ikki at sleppa undan avbjóðingum, tað týdningarmesta er at koma í gjøgnum avbjóðingarnar ella at læra at liva við teimum. Tað vísir seg sjáldan, at tey, sum sleppa lættast, eru tey mest eydnusomu. Mamma mín, sum andaðist herfyri, plagdi at siga: "Der er stubber og sten på vår vej. Der er modgang for dig og for mig. Hvad glæde vidste den, som ikki kendte til at græde".

Minnist til at liva og njóta tað, sum er gott. Tit koma í mótvind viðhvørt, men tað er í lagi. Tit vera sterkari av tí. Ansið eftir ikki at lata mótgongdina definera tykkum. Brúkið heldur kreftir uppá at finna alt tað góða, sum er í millum tað ringa.

## Góðu pisur

Latið maskinurnar gera tað tunga arbeiði. Tað eru longu nógv ár síðan ein krani kláraði at lyfta meira enn ein sterkur maður, og at ein telda roknaði skjótari enn nakað menniskja.

Vit í skúlaverkinum hava ikki altíð megna so væl at fylgja við tíðini. Tí sýnist tað sum vit nokta tykkum at nýta nýggjastu tøknina. Tað er ikki ætlanin. Avbjóðingin hjá okkum er at finna javnvág millum nýtslu og misnýtslu.

Hóast maskinur kunnu líkjast menniskjum, so er grundleggjandi munur á maskinum og menniskjum. Eins og vistskipanin, so eru menniskju nógv kompleksari enn tað, vit eru før fyri at endurskapa. Nøkur halda, at maskinur eru ein hóttan í móti okkum menniskjum. Men tað haldi eg ikki. Maskinurnar eru ikki vandamiklari enn tey, sum stýra teimum. Tí mugu tit ikki lata tøknina ráa yvir tykkum. Tað eru tit, sum skulu ráa yvir tøknini.

## Góðu pisur

Í gjárkvøldið vóru vit vitni til eitt bragd. Bragdið fór fram í Póllandi og millum teirra, sum framdu tað vóru tríggjar av okkara egnu pisum. Sofus, Trygvi og Tóki. Tykkara skúlafelagar og tykkara føroysku javnaldrar annars gjørdu tað, sum eingin annar nakrantíð hevur gjørt. Vunnu Føroyar í eina semifinalu til HM. Minsta tjóð nakrantíð í eini HM semifinalu.

Eitt slíkt bragd er í sjálvum sær heilt ótrúligt, stuttligt at uppliva og man dysturin í kvøld ikki eisini fara at seta sín dám á mangar pisuveitslur.

Slíkar hendingar ímynda ta optimismu, sum eg haldi eyðkennir tykkum.

Av náttúrligum orsøkum, so kenni eg júst tykkara árgang rættiliga væl, og satt at siga, so er eg eri rættiliga vónríkur um framtíð tykkara.

Eg trúgvi upp á tykkum. Tað gera vit øll her á Kambsdali, tí í nógvum førum eru tit meira umhugsin, vinalig og ábyrgdarfull enn mítt ættarlið.

Tit tora at tosa um tað, sum er trupult. Tit tora at seta spurningar. Tit tora at taka ábyrgd. Tað kann gott vera at tit ikki duga nógv av tí, sum var neyðugt fyrr í tíðini. Men tá tað kemur til nútíðar viðurskifti, so duga tit sum oftast nógv betur enn vit.

Tí vænti eg, at tykkara framtíð er ljós. Ikki tí at tit sleppa undan illveðrinum, men tí at tit finna eina meining og duga at finna loysnir - eisini tá harðast leika á. Júst sum U21 dreingirnir í gjárkvøldið og júst sum fyriskiparararnir av Voxbotni, nú illveðrið bókstaviliga sær út til at raka í morgin.

Við íblástri úr grisku mytuni um Ikaros, ið fleyg ov nær sólini, so kunstigu voksveingirnir smeltaðu, tekur Bjørn Afzelius soleiðis samanum í sanginum við sama navni:

“Lat tínar blómur festa rót í góðum lendi
Og lat plantur tínar grógva vilt og vítt
Tí í vakstrarhúsi saknast sól og vindur
Í náttúruni tær kunnu vaksa frítt”

## Góðu pisur

Eg skal at enda ynskja tykkum allar bestu eydnu í framtíð tykkara. Takk fyri tíðina her á dalinum og hjartaliga til lukku við prógvnum!

Og minnist til, at mannalívið er fjølbroyttari og litríkari, enn nakað vakstrarhús ella nakar kunstigur inteligensur kann skilja og fáa tamarhald á. Farið nú á flog, men gloymi ikki av og á at seta tykkum á okkurt vegamót at leika fiól og lata røturnar fáa eitt munagott festi.

Takk fyri og Jesus fylgi tykkum!

Christian Joensen, rektari.